# Frá bóndaaspiran

**Tað lá ongantíð í kortunum, at Tommy Andreasen skuldi velja eina lívsleið sum flogskipari. Sum smádrongur og hálvvaksin var tað nevniliga rokaliga lívið á bygd við seyði, neytum, skrúvan á knallert og útróðri, ið lá fremst í huganum**



Leo Poulsen

Tað var einki, sum bendi á, at Tommy Andreasen skuldi enda sum flogskipari, hugurin lá meiri til bóndaskap og útróður, men eini arbeiðsørindi vesturi í Vágum vendi huganum heilt til flogfør og flúgving.

– Øll barnaárini rokaðist eg sum ein rættur bygdadrongur nú einaferð ger. Mær dámdi ógvuliga væl at skrúva upp á eitt nú knallertir, og so hekk eg í reyvini á tveimum tilkomnum monnum, sum ofta róðu út saman, sigur Tommy Andreasen.

Annar teirra var størsti kongsbóndi í Nólsoy, og hevði tí bæði neyt og seyð, og tað ruku nógvir tímar av barnaárunum hjá Tommy í fjósinum saman við seyði, kúm og kálvum.

– Eg kláraði ongantíð at sita stillur, og so má eg viðganga, at eg skulkaði, tá eg fekk ein tjans, sigur Tommy Andreasen.

Hann hevur altíð verið framfarandi og ósmæðin, men tað var kortini ein stór broyting í lívi hansara, tá 9. flokkur var liðugur í Nólsoy, og hann fór til Havnar at ganga í 10. flokki.

Innan ítrótt var tað kappróðurin, ið vann hansara stóra áhuga, og hann róði kapp øll árini, hann var í Havn.

– Tá eg var liðugur við 10. flokk fór eg til skips. Pápi mín hevði verið kokkur umborð á Hvilvtenni, og tann vegin fekk eg, sum tá bert var 16 ára gamal, tjans við hesum stóra rækjubátinum hjá Kjartani Joensen í Leirvík, sigur Tommy Andreasen.

## Í læru

Hann sigldi so við Hvilvtenni í eitt knapt ár, áðrenn honum stóð í boði at fáa lærupláss á Tórshavnar Maskinverkstaði, sum Kaj Olsen úr Nólsoy eigur saman við tveimum øðrum.

– Sum nevnt havi eg altíð havt sera góðan hug at skrúva, og tað var helst ein av orsøkunum til, at eg tók av at læra til maskinsmið, sigur Tommy Andreasen, sum byrjaði í læru tann 3. september 2003, 17 ára gamal.

Næstu árini gingu so við at læra til maskinsmið, og frítíðina brúkti hann í stórt mát til kappróðurin. Men í bakhøvdinum lá eisini ein annar áhugi og lúrdi, tó uttan av álvara at vinna fram í hugaheiminum.

– Eg havi altíð havt áhuga fyri flogførum og flogvinnu, men fyri mær var hetta tá ein fjarur tanki at kunna ganga tær leiðirnar. Eg ímyndaði mær altíð stórt studentsprógv við høgum karakterum, so tað tóktist mær óuppnáiligt, sigur Tommy Andreasen.

Men ein túrur vestur á flogvøllin í Vágum broytti fullkomiliga hansara hugsunarhátt.

– Tað var ótrúliga bergtakandi at síggja øll flogførini lenda og fara á flog. Eg gjørdist púra bitin av hesum, og tá eg kom aftur til Nólsoyar fór eg beint inn á telduna at leita eftir flogskiparaskúlum, sigur Tommy Andreasen.

Tað fall heilt náttúrligt at leita eftir hesum flogskúlum í Danmark.

– Mær hevur ongantíð longst eftir at sleppa til eitt nú Onglands ella USA at útbúgva meg, sum so mong onnur tráa eftir. Eg hevði fleiri vinir, sum lærdu í Danmark, og tí fall tað náttúrligt hjá mær at leita tann vegin, sigur Tommy Andreasen.

## Seldur

Hann fann fram til ein skúla, sum eitur Center Air Pilot Academy, og liggur í Roskilde.

– Eg gjørdi so tað, at eg ringdi niður á skúlan at spyrja meg fyri, hvørjar treytirnar vóru fyri at sleppa inn. Tey vóru bæði blíð og tíð og greiddu mær frá, at eg mátti til eina upptøkuroynd innan fakini danskt, enskt og fimisrokning. Tey buðu mær annars endiliga at koma framvið, um eg var í Danmark, sigur Tommy Andreasen.

Tað gekk ikki leingi, so hevði hann keypt ein flogferðaseðil til Danmarkar at vitja skúlan. Og var hann ikki vísur í karrieruvalinum áðrenn, so sannførdi hendan ferðin hann fullkomiliga um, at hann skuldi verða flogskipari.

– Á túrinum á veg niður til Danmarkar tosaði eg við flogskiparan og stýrimannin, og eg greiddi teimum frá mínum ørindum. Tað endaði við, at stýrimaðurin bjóðaði mær at sita í hansara stóli allan vegin niður og undir lendingini eisini. Tá varð eg púra seldur, sigur Tommy Andreasen.

Á skúlanum var hann ógvuliga væl móttikin. Hann varð vístur runt á skúlanum og fekk greitt frá, hvussu undurvísingin fór fram, og hvørji krøvini vóru, at verða upptikin.

– Danskt og enskt lá rímiliga væl fyri hjá mær, men í rokningini haltaði eg nakað eftir. Eg gjørdi tí av av ganga til rokning í kvøldskúla á Eysturskúlanum, og tað má eg siga er ein av bestu avgerðum, eg havi tikið, sigur Tommy Andreasen.

Tá upptøkuroyndin so var í januar 2007, stóð hann við ein glans.

– Eg mátti tó lata tey vita, at eg ikki kundi byrja við tað sama, tí eg var ikki liðugur við maskinsmiðslæruna. Tað spældi eisini inn, at eg róði kapp, men eg brúkti tíðina til at gera sveinastykki og til at fáa heilsukanningina frá hondini á Ríkissjúkrahúsinum, sigur Tommy Andreasen.

## Í skúla

Tað er sjálvandi nógv at fáa greiði á, tá tú skal flyt av landinum, millum annað skal tú hava eitt stað at búgva, tú skal søkja um studning og annað líkt.

– Eg má siga, at eg altíð fekk ógvuliga fríar teymar



*Pápi Tommy, Napoleon Andreasen, vanliga nevndur Pole, fekk møguleikan at flúgva við soninum á veg heim úr Noregi, har hann siglir. Her eru feðgarnir avmyndaðir saman við einum vinmanni hjá Tommy*